# ítróttur

Nr. 221 • hósdagur • 15. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kyndil grevur fólkið fram



*Her sita teir báðir á Kyndils beinkinum á heysti 1998, men sunnudagin verða Bárður Johannesen og Hartvig Joensen mótstøðumenn á vøllinum, tá Kyndil og Tjaldur skulu stríðast fyri at sleppa undan botnsessinum.*

**Hann hevur ikki spælt fyrstudeildar hondbólt í hálvt triðja ár, men sunnudagin verður Bárður Johannesen eftir øllum at døma á Kyndils liðnum, sum skal royna seg móti Tjaldri**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er ikki frítt, at viðhaldsfólkini hjá Kyndli eru eitt sindur vónsvikin av úrslitunum, sum lið teirra hava fingið higartil í vetur. Bæði kvinnur og menn halda til heilt niðarliga á stigatalvuni, og meðan hetta ikki er so heilt forkunnugt hjá kvinnunum, so er talan um eina fullkomuliga nýggja støðu hjá mansliðnum.

## Bulurin burtur

Ikki tí. Sagt varð undan kappingini, at nú skuldi eitt nýtt lið byggjast upp, og at hetta fór at taka sína tíð, men sjálvt ikki tey mest svartskygdu høvdu roknað við einum botnsessi, eftir at øll liðini høvdu hitst einaferð.

Alt hevur tó sínar orsøkir, og soleiðis er eisini í hesum føri. Kyndil hevur uttan iva verið óhepnasta liðið í ár, tá tosað verður um skaðar, og lazarettin hjá felagnum sær í løtuni soleiðis út: Róar Nielsen (knæskaða), Heini Bendtsen (knæskaða), Ragnar Simonsen (bruna í hælsinuni), leikandi venjaran Jónleif Sólsker (skaddur í økslini) og Janus Einar Sørensen (hálsbruna og pínu í rygginum). Hartil kann sigast, at Hanus Jensen, sum í fjør veruliga fór undir hondbóltin aftur, enn ikki hevur fingið vant, eins og Niels Viggo Niclassen hevur ein eyman, tó at hann helst fær spælt kortini.

Allir hesir leikarar vóru undan kappingarárinum avgjørt at rokna millum teirra, sum skuldu vera bulurin á liðnum, sum nýggir leikarar skuldu stuðla seg uppat, men tá hesir eru skaddir, er einki at siga til, at úrslitini ikki eru av teimum bestu.

## Bárður við aftur

Neyð lærir tó nakna kvinnu at spinna, verður sagt, og í Kyndli verður eisini leitað eftir loysnum upp á hendan trupulleikan, sum má sigast at vera sera átrokandi. Ikki minst nú botnuppgerðin móti Tjaldri stendur fyri framman.

Heilt konkret, so hevur hendan leitanin fyribils givið úrslit í, at Bárður Johannesen, ið fyri trimum árum var liðskipari hjá silvurliðnum hjá Kyndli, nú er farin undir venjingina. Bárður hevur annars verið - ja, gita – drigist við ein skaða í fótinum seinastu mánaðirnar, men tykist nú vera um at koma fyri seg aftur.

## Ikki leikbannaður

Hjá teimum, sum hava hugt at seinastu dystunum hjá Kyndli, kemur tað kanska ikki heilt óvart á, at Bárður nú aftur verður at síggja á vøllinum.

Kropsliga og sálarliga sterki spælarin hevur seinastu dystirnar verið at sæð á beinkinum, har hann hevur givið venjaranum og vinmanninum, Jónleifi Sólsker, eina hjálpandi hond.

Her fekk hann fyri hálvari aðru viku síðani reytt kort, tá Kyndil tapti fyri StÍF, men hóast hetta, so er hann ikki leikbannaður til dystin móti Tjaldir. Reglurnar fyri leikbann eru nevnliga soleiðis háttaðar, at tað ikki er tað sama, hvørt tað er ein leikari ella ein sonevndur official, sum fær reyða kortið.

Fær ein official reytt kort, skulu dómararnir skrivliga boða HSF frá hesum, og kann sambandið tá gera av, at viðkomandi skal hava leikbann. Er talan um leikara, skal hesin hava leikbann, og tað er so ein ávísur munur ímillum hesar orðingar. Kyndil hevur ikki fingið nærri boð um hendingina, og tískil er Bárður, sum annars fylti 28 ár í gjár, tøkur sunnudagin.

# Tey stóru koma til



*Seinnu árini hevur talan verið um nakrar sera spennandi steypafinalur hjá bæði kvinnum og monnum, og nú verður av álvara farið í holt við Coca-Cola kappingini fyri hendan veturin*

**Komandi tvær vikurnar skulu hópin av dystum í Coca-Cola kappingini í hondbólti avgreiðast**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltslandskappingin fyri veturin er longu komin fjórðings leið, og nú verður so eisini farið í holt við steypakappingina. Tað sonevndu Coca-Cola kappingina.

Eftir at veikaru liðini í landinum hava spælt dystirnar í fyrsta umfarinum, verður nú farið undir annað umfar, har liðini í bestu mans- og kvinnudeildunum eisini skulu taka lut.

Lutakast um, hvussu liðini skulu hittast, var um vikuskiftið, og niðan fyri sæst, hvørjir dystir verða á skránni hetta umfarið.

Sum lesarin helst sær á dystaryvirlitinum, so kemur ikki fyri, at tvey lið úr bestu deildini skulu spæla ímóti hvørjum øðrum. Hetta kemst av, at Hondbóltssambandið hesi fyrstu umførini tilskilar sær rætt til at styrkismeta liðini, soleiðis at sleppast kann undan, at eitt nú Neistin og VÍF hjá monnum ella VÍF og Stjørnan hjá kvinnum bresta saman alt fyri eitt. Ikki fyrr enn til hálvfinalurnar verður talan um reint lutakast.

HSF ásetur ikki leikdagar fyri dystirnar í øðrum umfari, men tó verður álagt feløgunum at hava avgreitt dystirnar áðrenn 1. desember.

## Dystirnir eru hesir:

Kvinnur:
Sóljan I – Neistin III
Stjørnan III – Stjørnan I
Tjaldur III – Kyndil I
Kyndil III – Neistin I
VÍF II – VÍF I
Kyndil II – Tjaldur II
VB II – VB I
Neistin II – StÍF I

Menn:
StÍF I – VB II
VÍF I – Kyndil II
Kyndil a III – H71 I
Neistin a III – KÍF I
Tjaldur I – H71 a III
Neistin I – VÍF II
Kyndil I – KÍF a III
StÍF II – Neistin II



# Terji og kettlingarnir




*Terji Rasmussen hevur lagt nýggjastu føroysku barnafløguna til rættis. Fløgan kann bæði brúkast í fløguspælara og í telduni*

**Í dag kemur nýggj barnafløga út. Terji Rasmussen stendur fyri útgávuni, sum bæði umfatar tónleik, søgu og spøl til telduna**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Terji og kettlingarnir.

Soleiðis rópast nýggj fløga til børnini, sum kemur út í dag.

Maðurin aftanfyri útgávuna er Terji Rasmussen, sum fólk ivaleyst kenna frá bólkum sum Frændum, Føstufressum og Moirae.

Nú roynir hann seg við tónleiki til børnini. Hetta hugskot hevur hann havt í fleiri ár, men nústani er tað vorið veruleiki.

Terji hevur skrivað 9 av teimum 12 sangunum á fløguni. Tveir eru týddir úr donskum, og ein hevur James Olsen syrgt fyri.

- Fløgan er ikki lættisoppi. Eg havi roynt at gjørt tónleikin soleiðis, at øll kanska ikki svølgja bitan beinanvegin, men hann skal smakka nokk so væl í longdini, sigur Terji Rasmussen.

– Tað er eingin orsøk at undirmeta børnini sum brúkarar av tónleiki. Tí roynir hendan sløgan av vera eitt sindur avbjóðandi, tá tað ræður um tónleikin.

## Eisini til telduna

Á fløguni eru 12 sangir, men hon rúmar eisini ymiskt annað.

Rógvi mús og tann stóri ljóti fressurin kallast ein søga, sum verður søgd á fløguni. Harafturat eru eisini telduspøl til børnini.

Til eina sangin er ein annimatión gjørd, og hana kunnu børnini síggja á telduni.

Fløgan kann sostatt bæði brúkast í vanliga fløguspælaranum og í telduni.

- Vit mæla vaksnum til at seta seg við børnunum og læra tey at brúka fløguna, men hon er sera einføld gjørd, so tað er einki kynstur at brúka hana, sigur Terji Rasmussen.

Fløgan er framleidd í Keypmannahavn, har Terji hevur sítt egna studio. Tað er 3'arin, sum gevur fløguna út.

# I AM konsert á Glyvrum

**Fríggjakvøldið verður konsert við gospelbólkinum I AM í Støkk-høllini á Glyvrum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Fríggjakvøldið kl. 23.00 hevur gospelbólkuri I AM konsert á Glyvrum. Konsertin verður í Støkk-høllini, og har rúmast 220 fólk inn.

Atgongumerkini til hesa konsertina verða seld í forsølu í Kiosk Vár í Saltangará, og tey kosta 80 krónur. Tey atgongumerki, sum ikki verða seld í forsølu, kunnu fáast við dyrnar, tá konsertin verður.

I AM hevði fyri kortum konsertir í Atlantis í Klaksvík, og hesar konsertir eydnaðust sera væl. Skráin á konsertini fríggjakvøldið verður lík henni í Atlantis.

# Týr vónar at fløgan kemur til jóla

**Rockbólkurin Týr ger framvegis upptøkur til nýggju útgávuna, og teir vóna at koma út við fløguni í hesum árinum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Týr hevur farna mánaðin brúkt nógva tíð í studio í Keypmannahavn, har upptøkurnar til nýggja fløgu við bólkinum fara fram.

Tað hevur verið nevnt, at fløgan hjá teimum skal koma út fyrst í komandi ári, men nú stríðst bólkurin við at fáa upptøkurnar lidnar, so fløgan kann koma út fyri jól.

- Vit eru ikki lidnir við upptøkurnar enn. Tað tekur einar tvær ella tríggjar vikur afturat, men vit ætla at gera alt fyri at fløgan kemur út fyri jól, sigur Heri Joensen, gittarspælari í bólkinum.

Upptøkurnar til Týr-fløguna fara fram í Toccata studio í danska høvuðsstaðnum.

# Óli Poulsen ljóðblandar Chase



*Chase vónar, at tíðarætlanin fyri útgávuna heldur*

**Føroyski tónleikaframleiðarin Óli Poulsen ljóðblandar hesa vikuna tónleikin á nýggju útgávuni hjá Chase**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Ætlanin er, at nýggja fløgan hjá Chase skal koma á marknaðin seinasta dagin í november, men hvør tími er ein bardagi fyri at halda tíðarfreisina.

Óli Poulsen hevur hesa vikuna ljóðblandaa tónleikin á fløguni, og hann skuldi eftir ætlan verið liðugur við hetta arbeiðið í vikuni. Húsin er snikkaður til, og tá tónleikurin er liðugt ljóðblandaður, skulu fløgurnar framleiðast.

- Tað skal lítið til fyri at seinkað útgávuni, men enn tykist tíðarætlanin at halda, sigur Edmund Jacobsen, sangari í bólkinum.

Chase hevur tiki tónleikin upp til fløguna seinastu vikurnar, og hesar upptøkur eru gjørdar í Danmark og í Føroyum.